













# Góð og vælhildin hús við framúrskarandi útsýni

Í friðarliga umhvørvinum á Dalavegnum í Havn standa eini sera góð og vælhildin hús. Tú sært alt fyri eitt, at her búgva fólk, sum ynskja, at alt er vælhildið og í ordan – bæði innan og uttanfyri.

Húsini standa nakað frá høvuðsvegnum. Ein innkoyring førir niðan til húsini og kanst tú koyra beinleiðis inn í bilskýlið, sum eisini hevur ein góðan skúrð. Við høvuðsdyrnar eru flisar lagdir á túnið. Góður og vælhildin urtagarður er rundan um húsini við fleiri sera flottum lagaðum grótgarðum. Her eru nógvir góðir møguleikar hjá teimum, sum hava hug at fáast við urtagarðsarbeiði ella bara at nýta tær góðu løturnar í urtagarðinum.

Útsýnið er framúrskarandi og sært tú nærum alla Havnina, Nólsoynna og fjørðin.

Húsið er sera væl innrættað og hevur gott pláss til eina stóra familju.

Í miðhæddini er ein durur við atgongd til ein góðan hjallin, stór gongd, baðirúm, køkur, stova, eitt kamar og ein stór sjónvarpsstova, sum upprunaliga hevur verið tvey kømur.

Á loftinum eru tvey stór og góð kømur og ein hugnalig loftsstova.

Í kjallaranum er eitt kamar, kontór, ítrivsrúm, gloymslurúm og eitt baðirúm. Góður møguleiki er fyri at gera eina íbúð í kjallaranum.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Add.: | Dalavegur 60, Tórshavn |
| Byggiár: | 1967 |
| Hæddir: | 3 |
| Støðd innan: | 220 fermetrar |
| Grundøkið: | 529 fermetrar |
| Prísuppskot: | Kr. 3.000.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**